

# Trygdarleiðari

## Statoil Føroyar søkir eftir kvinnu ella manni at leiða trygdararbeiði felagsins

### Starvið
Sum trygdarleiðari stendur tú á odda fyri heilsu-, trygdar- og umhvørvisøki okkara, eisini kallað HTU. Starvsøkið fevnir um alt virksemi okkara, t.e. útkoyring, goymslur, hitatænastu, bensinstøðir, sølu og fyrisiting.

Statoilsamtakið raðfestir HTU-økið sera frammarlaga. Arbeiðið verður skipað við íblástri frá toymum, ið virka tvørtur um landamørk.

### Arbeiðsuppgávur
Dagurin sum trygdarleiðari er fjølbroyttur. Nakrar av uppgávunum eru at:

- Skipa fyri, at HTU framhaldandi er natúrligur partur av arbeiðsdegnum hjá starvsfólki okkara
- Leiða og skipa innanhýsis HTU-bólkar
- Gera innanhýsis mannagongdir
- Fylgja menningini við hagtølum
- Skipa fyri skeiðum
- Vera við í HTU-toymum hjá Statoilsamtakinum

### Tínir førleikar
Tú dugir væl við fólki, ert framtøkin, arbeiðir sjálvstøðugt og skipar arbeiði títt væl. Tú hevur hegni at bera orð tíni fram, bæði skrivliga og munnliga, og enskt er eingin trupulleiki fyri teg.

Fakliga hevur tú viðkomandi útbúgving ella royndir. Hevur tú ikki tað, men heldur teg vera egnaðan kortini, ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn, har tú greiðir frá, hví júst tú ert rætta fólkið til starvið.

### Okkara tilboð til tín
Vit bjóða tær eitt gott starv, har tú á mangan hátt skipar dagin eftir vild. Sum partur av altjóða samtaki bjóða vit tær góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning, har tú gerst partur av HTU-toymum hjá Statoilsamtakinum.

Starvið verður skipað sum stápsfunktión við beinleiðis tilvísing til leiðsluna. Lønin verður sambært avtalu, og eftirlønartrygging fylgir við.

Vilt tú vita meira, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Johan Poulsen, tekniskan leiðara, ella Niels Juel Nattestad, stjóra, á telefon 34 35 00.

### Hevur starvið tín áhuga?
Send eina umsókn í seinasta lagi 10. oktober 2006 til frnjn@Statoil.com, ella send vanligt bræv við frámerkinum "Trygdarleiðari" til:

P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

Umsókn tín verður viðgjørd í trúnaði.

*Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarunum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða umleið 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.*

**STATOIL**
*– fyri viðskiftafólk okkara*



# VINN EINA SKÍÐFERÐ FYRI 2 VAKSIN OG 2 BØRN FRÁ SMYRIL LINE



## Gisting í Voss ella Hemsedal
Fyri tann styttra túrin til Voss hava vit valt fyrstafloks íbúðir, sum liggja miðskeiðis í býnum. Allar íbúðir hava góða innrætting, fylgisveinasjónvarp, tekøk, køliskáp, uppvaskimaskinu og kókiplátur. Íroknað prísin er seingjarlín. Allar íbúðir hava egna terassu. Meira fæst at vita um íbúðirnar á www.smyril-line.fo ella www.fleischers.no

Á longra túrinum er roknað við 7 nætrum í íbúðum í Hemsedal og 2 nætrum í íbúð í Bergen. Hetta eru fyrstafloks íbúðir, sum ligggja miðskeiðis í ávikavist Hemsedal og Bergen. Meira um íbúðirnar á www.smyril-line.fo, www.fanitullen-hotell.com ella www.incity.no

Í samstarvi við Smyril Line fara vit hvønn dag í 14 dagar at skipa fyri eini spurnarkapping. Nýggjur spurningur verður hvønn dag í Sosialinum. Jú fleiri svar tú sendur inn, jú fleiri møguleikar hevur tú at vinna. Svarlepin skal tó vera kliptur úr blaðnum – avrit verður ikki góðtikið. Seinasta freist at senda inn er mikudagin 18. oktober. 2006.

**Vinningur:** Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili á leiðini Tórshavn-Bergen og aftur í 4 koyggjukamari við vindeyga og wc/bað. Allar máltíðir umborð eru íroknaðar. Hartil 9 nætur í íbúð fyri 4 persónar á Fleischers Apartment í Voss í Noregi. (máltíðir ikki íroknaðar). Virðið á ferðini er uml. kr. 11.995,-.

## Dagsins spurningur
Hvussu eita gistingarstøðini, sum Smyril Line nýtir í sínum tilboðum, í ávikavist Hemsedal og Bergen?

- ☐ Skogstad Hotel / Jacob's Apartment
- ☐ Alpin Apartments / Thon Hotel Orion Brygge
- ☐ Fanitullen Apartments / Incity Apartments

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Tlf. nr: ____________________

Sendi okkum loysnina til:
Sosialurin
Postmoga 76
110 Tórshavn
Merk brævbjálvan »Skíðkapping«







**VIRÐI: 11.995,-**

Sosialurin